## Mugabe má frá



Trýstið á zimbabwiska einaræðisharran, Robert Mugabe, økist í hvørjum. Í síðstu viku seghði suðurafrikanska stjórnin, at tað ber ikki til at fáa skil á í Zimbabwe, uttan at Mugabe slakar, og nú sigur amerikanska stjórnin, at Mugabe noyðist at leggja frá sær, skal tann politiska skipanin fáast í eina trygga legu. USA hevur fyrr skuldsett Mugabe fyri brot á fleiri altjóða reglur, men ein talsmaður hjá amerikanska uttanríkisráðnum segði um vikuskiftið, at USA fer ikki at krevja Robert Mugabe revsaðan, so leingi hann situr við valdið.

## Russar mótmæla biltolli

Í Russlandi eru fólk í øðini um, at stjórnin hevur hækkað tollin á bilum, sum verða innfluttir úr øðrum londum. Misnøgdin er so stór, at um vikuskiftið vóru mótmælisgongur í Vladivostok við Kyrrahavið og fleiri øðrum býum, skrivar Reuters. Løgreglan legði uppí og spjaddi mótmælisgongurnar. Russisku politikararnir siga, at teir hava hækkað biltollin fyri at tálma innflutninginum og fyri at verja tann russiska bilídnaðin, har hálv onnur millión fólk arbeiða. Men innfluttir bilar eru sera væl umtóktir í Russlandi og serliga har eystur í landinum, skrivar Reuters.

# Blikur sigldi á land

**Tað var ongin dramatikkur tá ið farmaskipið Blikur rendi á land inni í Tórshavnar Havn seinnapartin fríggjadagin og fekk nakað av skaða**

ÓHAPP

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Farmaskipið Blikur fekk nakað av skaða, tá ið tað rendi á land inni í havnarlagnum í Havn seinnapartin fríggjadagin.

Óhappið hendi um fimm tíðina seinnapartin fríggjadagin, tá ið Blikur skuldi leggja at bryggju í Havnini.

Av Havnarskrivstovuni verður upplýst, at Blikur kom inn um Molan akkurát sum ætlað og skuldi leggja stýriborðssíðu at.

Hann legði púra stilt, men tað var so nógv vindur av Molanum, at skiparin gjørdi av at venda skipinum fyri at fáa bógvin upp í vindin og leggja bakborðssíðu at ístaðin.

Skiparin gjørdi longu av úti á fjørðinum at brúka tann taktikkin, tí Blikur hevur bara eina skrúvu og tá ið hann bakkar, fer hann í bakborð.

Tá hendi eitthvørt, sum gjørdi, at hann fór við ferð inn ímóti Tinganesi og tað endaði við, at hann stóð uppi á Skinnaraskeri innanfyri Tinganes.

Men tað var gott veður til tað og tað var ongin vandi á ferð, tí tað sá nógv ógvusligari út enn tað var.

Á havnarskrivstovuni verður avsannað, at hann sigldi ov skjótt inn um Molan, tí hann lá púra stillur, tá ið hann skuldi venda bakborðssíðu til.

Annars er mest loyvda ferð inn um Molan fýra míl.

Klokkan 19.20 flotnaði hann av aftur, eftir at teir høvdu tømt nakrar tangar har frammi í skipinum og tað var fløðandi sjógvur.

Hann legði so at sum vant og varð lossaður.

Blikur fekk okkurt hol í ein vatntanga og leygarmorgunin fór hann yvir á skipasmiðjuna, MEST, har skaðin skal umvælast fyribils.

Væntandi fer hann avstað í dag ella í morgin og tá ið hann er komin til Danmarkar, fer hann í turrdokk í nakrar dagar at umvæla skaðan endaliga. Faroe Ship hevur útvegað annað skip, til Blikur fer í sigling aftur




*Myndin av Bliki uppi á turrum á Skinnaraskeri hevur Hans A Norðfoss tikið. Her eru eisini tvær teldugjørdar myndir frá AIS skipanini hjá Vikmar. Vikmar sigur, at myndirnar vísa, at á mynd 1, sum er tikin klokkan 16.55, sigldi Blikur 7,8 míl inni í havnarlagnum. Á mynd 2 sum er tikin klokkan 17.05, stendur hann á turrum og tá er Pressarin longu hjá honum*



*mynd 1*



*mynd 2*